# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tann eldhugaði frásøgumaðurin

# Mikkjal Nielsen er tagnaður



Mikudagin í síðstu viku fór vælkendi útisetin og klaksvíkingurin, *Mikkjal Nielsen* til gravar frá *Filipskirkjuni* á Amager, har pápi hansara Jóhan Nielsen var prestur í 60´unum. Mikkjal arbeiddi sjálvur í fleiri ár sum kórdeknur við somu kirkju. Hann bleiv bara 61 ár.

Tann blaðungi Mikkjal gjørdi tíðliga vart við seg sum heilhugaður journalistur í *Sosialinum*, har hann m.a. skrivaði um kendar popp-jassar og aktuelt tónarák, sosum "The Beatles" og tesslíka. Men tað, sum mest hugfangaði fólk, vóru teir spennandi søgustubbarnir, hann skrivaði í blaðið longu sum hálvvaksin óviti. Nógv minnast enn ta vældámdu frásøgnina um tað kenda týska slagskipið, Bismarck, sum stóð sum framhaldssøga í fleiri *Sosialum* miðskeiðis í trýssunum. Tá Mikkjal skrivaði, segðist leysasølan at hækka munandi í Klaksvík. Tí fólkaeydnu hevði hann, sum fáur.

Sum studentur luttók hann seinni dúgliga í tí føroyska útisetalívinum í 70´unum. Politiskt var hann, sum pápi hansara, ógvuliga hugaður socialdemokratur.

Heystið 1970 umboðaðu vit báðir, Mikkjal og eg *Tann føroyska Javnaðarflokkin* í studentafelagnum í Kjøpinhavn, og nógv væntaðu tá, at Mikkjal fór at taka arvin upp eftir pápa sín, men tað bleiv tíverri ikki. Stutt eftir gavst hann nevniliga heilt við føroyskum politikki og valdi heldur at engagera seg heilhjartaður í tí danska samfelagnum. Ein grundin var allarhelst tann bondska nationalismanogradikaliseringin, sum longu tá var við at rína við summar yngri javnaðarmenn, og hetta hóvaði als ikki Mikkjali. Hann var nevniliga avgjørdur *socialur samríkismaður*, sum jú var tann *klassiski* javnaðarpolitikkurin.

Í 70´unum og 80´unum arbeiddi Mikkjal við undirvísing og ymiskum kulturarbeiði við Filipskirkjuna. Við síni smittandi entusiasmu fekk hann aftur gongd í tað lokala skótaarbeiðið, og knáu konur hansara fylktust við honum í skótarørsluni. Hóast allan hendan aktivitet sást hann kortini ofta millum útisetar. Hann helt m.a. undirhaldandi søgufyrilestrar, bæði í Føroyingafelag og í Tí føroyska Kirkjuliðinum.

Best av øllum arbeiði dámdi Mikkjali at undirvísa. Og lívsuppgávu sína fekk hann so fyri 23 árum síðani, tá ið hann kom til Viby frískúla á Mittsjællandi. Viby er ein fittur lítil statiónsbýur, nakað sum Klaksvík til støddar, og í hesum idylliska umhvørvi stórtreivst Mikkjal. Hóast Viby liggur yvir 50 km frá Amager, har Mikkjal framvegis búði, koyrdi hann glaðbeintur vestureftir hvønn yrkamorgun.

Hesi síðstu tjúgu árini hava vit útisetar ikki hoyrt so nógv frá Mikkjali, men hann hevur kortini ferðast dúgliga til Føroya við skúlabørnum og øðrum donskum turistum. Fáur hevur verið mætari ambassadørur fyri Føroyar, og hann hevur fingið nógvar danskarar at leggja sínar feriur í Føroyum. Hann var alla sína tíð ótroyttiligur í sínum eldhugaðu frásagnum um Føroyar. Bert spell, at teir føroysku miðlarnir næstan heilt hava lopið hann um. Tí hann hevði nógv at fortelja, og hann *dugdi* at fortelja! **Hvat meira kunnu vit krevja av einum journalisti?**

Við ervið helt skúlastjórin, Per Kjærsgaard eina avbera persónliga røðu, sum eg viðhansara loyvi hjáleggi niðanfyri:

### Tale til Michels Nielsens begravelse

Der er et stort tomrum på *Viby Friskole* efter Michels død. Han har efterladt et stort tomt hul. Hvis Michel havde siddet her i dag, ville han utvivlsomt – med et stort grin – straks have sagt: "Hvad fa'en, skal du sidde og antyde, at jeg er for tyk". For han var altid slagfærdig og i besiddelse af stor selvironi.

Tomrummet er tydeligt på lærerværelset og på det personlige plan. Mere end 23 år er gået, siden Michel kom til *Viby Friskole*. I den tid har han naturligvis fået gode og nære venner blandt sine kollegaer. På selve skolen er savnet stort og indlysende. Men savnet er også meget stort i hele medarbejderflokken, også hos nye kollegaer.

På grund af Michels personlighed. På grund af hans vid og humor. På grund af omsorg og beredvillighed overfor sine kollegaer, og på grund af hans åbenhed overfor nye ideer og tanker.

Blandt skolens elever er savnet særlig stort. Mange af eleverne har haft Michel i årevis og fået et tæt forhold til ham. Det siger meget om Michel, at han – også hos de ældste elever – var i stand til at holde kontakten levende, *"på den fede måde"*, som det hedder med ungdommens sprog.

Mange lærere oplever, når de bliver lidt ældre, at det kan være svært at følge med og kommunikere med de unge. Men det kunne Michel. Først og fremmest fordi han *GAD* gøre det. Hans interesse og omsorg for eleverne og hans evne til at være åben overfor alt i tiden gjorde, at han i høj grad kom tæt på sine elever. I tiden under Michels sygdom og efter hans død har også mange tidligere elever været forbi skolens kontor og fortalt om, at de selv har haft Michel i skolen. Fortalt om en levende og dygtig lærer, som bare kunne det dér med ***at formidle***.

Også på det mere overordnede plan er Michel savnet. På en værdibåret skole, "en holdningsskole", som *Viby Friskole* er det af afgørende betydning, at der er ansatte, som står inde for dette værdigrundlag. Engagerede folk, som er med til at værne om det, men også med til at udvikle det, så det værdimæssige taler ind i sin egen samtid. Michel var absolut *Viby Friskoles* værdimæssige omdrejningspunkt. Netop det grundvig/koldske skolesyn må ikke være noget dødt og statisk, - tomme ord uden reelt indhold - men noget, der er levende til enhver tid. Det var Michel i høj grad eksponent for.

I kraft af hans personlighed, hans enestående viden og hukommelse, hans fortælleevne og fortælleglæde var han, om nogen, indbegrebet af det levende ord, som taler ind i sin tid. Han var gennem hele sit virke på skolen med til at holde og udvikle den pædagogiske og holdningsmæssige linje. Rigtig mange af de ting, vi gør på skolen og de tanker, der ligger bag, har deres rødder hos Michel. Men som nævnt havde han også stor åbenhed over for nye tanker.

Forrige mandag holdt vi en mindedag for hele skolen. Vi holdt fælles mindesammenkomst, hvor vi sang Michels yndlingssange og fortalte minder og historier. Vi så billeder fra Michels bog *"Sælkvinden"*, som er en genfortælling af et færøsk folkesagn. Senere, ude i klasserne, fortalte eleverne om deres oplevelser med Michel. Der var to ting, der gik igen. Livsglæden og evnen til at fortælle. Historierne og historien som blev levende, når han fortalte. Specielt huskede mange børn historierne om drengen *Sofus* og alle hans oplevelser. Og her er det, man ser, at hverdagens lærerarbejde giver mening. Når man ser børn, som i den grad er blevet *præget* af en lærer. Når man ser, hvordan lærerens værdier og historier lever videre i dem. Når man ser, hvordan de frø, læreren har sået med sine fortællinger, sin personlighed og sit arbejde, spirer og slår rod.

På sit dødsleje sagde Thycho Brahe: „Låt mig inte synas ha levat förgäves". En ting er sikkert: Michel Nielsen har ikke levet forgæves. Æret være hans minde! Vore tanker og medfølelse går til Michels familie i denne svære tid.

Aftaná røðuna skipaði Kjærsgaard fyri, at fylgiskarin sang *"Er lyset for de lærde blot"* hjá *Grundtvig*, sum skúlastjórin helt hóska væl til skúlatankarnar hjá Mikkjali og arbeiðið hansara á *Viby skúla*.

Hóast tað var mitt í vetrarferiuvikuni var Filipskirkjan á tremur við fólki, sum sýndu Mikkjali tann síðsta heiðurin.

**Virgar T. Dalsgaard**

**SPECIAL (20 kg)**
Turrfóður til vaksnar hundar. Er eisini sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum og til eldri hundar.
Fyri posan......kr. 450,-

**SØCLA (20 kg)**
Turrfóður til hvølpar, unghundar og tíkir, ið geva mjólk. Er eisini gott til aktivar hundar. SØCLA inniheldur C-vitamin.
Fyri posan......kr. 540,-

**SKYTTENs KAT (15 kg)**
Turrfóður til kettur við nógvum proteinum frá fiski, flogfenaði og eggum. Inniheldur úrdráttir úr høsnarungalivur.
Fyri posan......kr. 390,-




www.fodursolan.com · info@fodursolan.com · Telefon 21 19 96 ÓKEYPIS ÚTKOYRING Í TÓRSHAVN OG NÆRINDIS

**Dagurin**

**25. Februar. Victorinus**, deyður umleið ár 250. Halgisøgurnar eru ymiskar á máli. Summar siga, at hann varð tikin av døgum í Judea, aðrar í Egyptalandi og uppaftur aðrar í Róm.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*